## Lesturin meira altjóðagjørdur

**Nýggjastu tølini frá Stuðulsstovninum vísa, at talið á teimum, ið lesa uttan fyri Danmark, er vaksandi**

LESTUR
*tíðindaskriv*

Líkt er til, at altjóðagerðin ger seg galdandi á útbúgvingarøkinum, tá hugt verður eftir tølunum fyri, hvussu nógvir føroyingar lesa á hægri útbúgvingum uttan fyri Føroyar og Danmark.

Av øllum føroyingum á hægri útbúgvingum uttan fyri Føroyar í lestrarárinum 1997/98 lósu 94% í Danmark. Tey nýggjastu tølini frá 2005 vísa, at hetta talið nú er 85%!

Tølini frá Stuðulsstovninum vísa, at føroyingar, sum lesa á hægri útbúgvingum, lesa í hesum londum (lestrarárið 2004/2005):

| | |
|---|---|
| Føroyar | 552 |
| Danmark | 779 |
| Hini Norðurlondini | 30 |
| Uttan fyri Norðurlond | 106 |

Tann 1.11. 2005 vóru 110 lesandi í ÚSUN-skipanini - í hesum londum:

| | |
|---|---|
| Stóra Bretland | 89 |
| USA | 6 |
| Australia | 5 |
| Spania | 2 |
| Frakland | 2 |
| Belgia | 1 |
| Italia | 1 |
| Sveits | 1 |
| Ísrael | 1 |
| Kanada | 1 |
| Ný Sæland | 1 |

Flestir føroyingar, ið lesa uttan fyri Norðurlond, lesa í enskt-mæltum londum, nevniliga 93%!

# Atlantic víðkar rutunetið

**Frá 23. juni til 4. september komandi ár fer Atlantic Airways at flúgva rutuflúgving millum Hetland og London**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*



*Í summar royndu flogførini hjá Atlantic seg á vøllinum í Sumburgh, tá føroysk oyggjaleikafólk skuldu flytast aftur og fram*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinastu árini hevur føroyska flogfelagið í summarmánaðum røkt flúgving millum Vágar og Stansted í London. Tann flúgvingin verður nú víðkað, soleiðis at Hetland eisini verður fevnt av rutunetinum hjá føroyska flogfelagnum.

Atlantic Airways hevur frá loftferðslumyndugleikunum fingið loyvi at flúgva millm Sumburg í Hetlandi og Stansted.

Og í Hetlandi tykjast fólk vera ovurfegin um n‡ggja tilboðið. Í Shetland Times verður parlaments-limurin hjá Hetlandi og Orkney endurgivin fyri at siga, at hetta heilt víst er eitt tilboð, sum hann fer at gera stóra nýtslu av. Og hann leggur afturat, at tað fara onnur helst eisini.

- Eg ferðist nógv millum Hetland og London. Og á morgunrutuni til Aberden og síðani til London, eru tað nógv fólk, sum eg síggi aftur mest sum dag um dag. Hjá okkum vil tað í øllum førum verða nakað nógv meira ómaksleyst við nýggja tilboðnum, og tað einasta, sum eg harmist um, er, at tíðarskeiðið við fastari flúgving ikki er longri enn tveir mánaðir, sigur Alistair Carmichael.

Hartil heldur hann, at rutan kann geva hetlendskari ferðavinnu eitt veruligt íkast, nú tað verður munandi lættari hjá London-búgvum at ferðast til Hetlands.

At enda leggur hetlandski blaðið afturat, at prísurin hjá føroyska felagnum væl og virðiliga er kappingarførur. Bara til Aberdeen liggur prísurin á einum retur-ferðaseðli millum 100 og 300 bretsk pund. Prísurin fyri ein returferðaseðil á nýggju rutuni er ásettur til £154.

# Umskipað Markleys Útbúgving

**Afturvendandi kunningarátakið um lestrarmøguleikar burturi og heima verður skipað eitt sindur øðrvísi í hesum skúlaárinum í mun til undanfarnu árini**

ÚTBÚGVING
*tíðindaskriv*

Hesaferð verða 4 umfør, tað fyrsta var 19. og 20. september. Annað umfar verður 15. og 16. november 2005. Tá fara umboð fyri MFS, British Council í Keypmannahavn, Norska studentafelagið ANSA og Study Abroad at greiða komandi studentum frá lestrarmøguleikum í Føroyum og aðrastaðni. Kunningin verður á teimum trimum stóru miðnámsskúlunum.

Fyrrapartin týsdagin 15. nov. kl. 10.00 verður tiltakið á Handilsskúlanum í Havn, seinnapartin kl. 12.00 í Hoydølum og fyrrapartin mikudagin 16.nov. kl. 10.00 á Kambsdali. Harafturat verður skipað fyri kunningarkvøldi týskvøldið 15.nov. kl. 19.30 í høllini á Studentaskúlanum á Kambsdali. Øll tiltøkini vara uml. tveir tímar og eru ókeypis.

Kl.12.45 - 14.15 og um kvøldið kl. 19.30 - 21.00 mánadagin 14. november verður skipað fyri kunning um lestrarmøguleikar burturi og heima á Miðnámsskúlanum í Suðuroy, har MFS, Study Abroad og Altjóða Skrivstovan luttaka.

Skráin á øllum fýra tiltøkunum í hesum umfarinum verður hendan:

**Stóra Bretland:** Jaqueline Guerrier, Education Manager frá British Council í Keypmannahavn.

**Noreg:** Heidi M. Engelsåstrø, kunningarfólk frá ANSA - Association of Norwegian Students Abroad.

MFS - Meginfelag Føroyskra Studenta um tað at vera lesandi

Study Abroad: Peter Bosteen, www.studeri-udlandet.dk

Spurningar til tey einstøku umboðini.

Triðja tiltakið í røðini verður 11. og 12. januar 2006, og fjórða og seinasta tiltakið verður 9. og 10 . mars 2006. Við á komandi tiltøkunum verða umboð fyri fleiri ymisk lestrarlond og stovnar.

Tað eru Mentamálaráðið, Lestrarvegleiðarafelagið, MFS og Altjóða Skrivstovan, sum skipa fyri Markleys Útbúgving 2005/2006. Holger Arnbjerg á Altjóða Skrivstovuni er samskipari.

Made by you

Fríggjadagin 11. november kl. 12.00-18.00 og leygardagin 12. november kl. 10.00-14.00 vitjar ein serfrøðingur frá Montana Idé Møblar á Hálsi.
Kom og fá góð ráð og vegleiðing um innrætting við Montana.






Seinasta freist at bíleggja Montana til levering innan jól er 12. november

Montana er ein skipan, ein fræls skipan, sum tú frítt kanst dusa tær innanfyri.
Útgangsstø i  er einfalt, men rúmar óendaligar møguleikar.
Lat hugflogi  reika vi  sni i, litum og virkni.
Dyrka frælsi  og tak fólk á bóli vi  sansaligum skapanarhugi og opnum sinni fyri nýggjum møguleikum.
Og vís hvør tú ert gjøgnum títt rúm.
Tí bara tú merkir, nær tú stendur í tínum rúmi.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80

Montana